## Ranvá Holm Mortensen í Smiðjuni

Frá Kristihimmalferðardegi 17. mai til 23. mai hevur Rannvá Holm Mortensen framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýndar verða 24 nýprentaðar plakatir, og evnið er eitt úrslit av einum tríggjar mánaðar uppihaldi í India. Framsýningin letur upp hósdagin klokkan 15 til 18, og verður opin allar dagar somu tíðir, uttan leygardag, tá verður opið millum klokkan 13. og 18

## Styrkja byrgingar

Danska stjórnin hevur gjørt av at játta átta mió. krónur eyka til at styrkja nakrar av byrgingunum, sum verja láglendið ímóti sjónum. Avgerðin hevur samband við, at fleiri byrgingar fóru illa í illveðri í vetur, soleiðis at stór øki stóðu undir í sjógvi. Í onkrum føri høvdu fólk einki samband við umheimin í dagavís. Á verandi fíggjarlóg hevur Fólkatingið játtað fýra mió. krónur til at styrkja byrgingar, men tann játtanin røkkur ikki.

# Fjølbroytt sendiharravitjan í Føroyum

**Ikki færri enn 76 sendiharrar og makar, umboðandi 42 ymisk lond, eru á vitjan í Føroyum í hesum døgum**

VITJAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Sendiharrarnir, sum eru gestir hjá landsstýrinum, eru úr fjarskotnum londum sum Korea, Mexico, Thailandi, Vietnam, Ghanam Uganda og nógv aðra staðni.

Tey komu til landið fyrrapartin sunnudagin, og fara tey avstað aftur í morgin árini, týsdag. Skráin sum fremmandu gestirnir skulu ígjøgnum hesar dagarnar er bæði spennandi og tøtt.

### Í Suðurstreymi

Sunnudagin vóru tey á vitjan í Kirkjubø og síðani til døgurða á Føroya Tele, har Jóannes Eidesgaard, løgmaður, var vertur.

Fyrrapartin mánadagin vitjaði fylgið úti á Tinganesi, í Løgtinginum og hjá Ríkisumboðnum. Síðani verður farið út í Mullers Pakkhús, har Heðin Mortensen, borgarstjóri, flytur fram røðu. Síðani sleppa sendiharrarnir at spáka sær ein túr í býnum, áðrenn farið verður niðan í Norðurlandahúsið, har Niels Halm, stjóri, bjóðar vælkomin. Har fer Bjarni Olsen, stjóri í Eik, eisini at greiða frá um fíggjarvíðurskifti Føroya. Og Bogi Hansen, professari í havumhvørvi, fer at greiða frá um veðurlagsbroytingar og havstreymar. Har fer Elin Heinesen, stjóri í Samvit, at greiða frá um ferðavinnu, fíggjarviðurskifti og mótavinnuna. Til endans fer Jóan Pauli Joensen, rektari á Setrinum, at greiða frá um føroyska søgu og mentan.

### Vitja norðanfyri

Týsdagin vitjar ferðalagið í Klaksvík, har Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri tekur ímóti í býráðshúsinum. Vitjað verður í P/F Landingarmiðstøðini, har Kristian Fríðrik Olsen, stjóri, greiðir frá. Síðani verður vitjað í Christianskirkjuni, har Alex Sólstein greiðir frá um kirkjuna, og kórið Suð syngur.

Um middagsleitið verður farið til Runavíkar, har Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri, tekur ímóti og greiðir frá. Har verður eisini døgurði í býráðshúsinum, og vitjað verður á P/F Bakkafrost, har Regin Jacobsen, stjóri, greiðir frá. Túrurin endar við einari vitjan hjá P/F Töting.



Mr. Dmitriy B. Ryurikov, sendiharri Russlands í Danmark, er upprunaliga úr Moskva. Hann heldur vitjanina í Føroyum vera ómetaliga spennandi, og sigur seg líka væl frælsishugsjón føroyinga gjøgnum allar tíðir. Hann hevur stóra virðing fyri, at vit hava megnað at skipa okkum við fólkaræði, og at vit, hóast stóru fjarstøðuna við umheimin, eru so modernað og mentað. Hann hevur stóra virðing fyri fosturlandskærleikanum hjá føroyingum, og so líkar honum væl humorin her uppi.

Hann fegnast um, at hava havt høvi til at práta við løgmann, og er hann vissur í, at ferðin í Føroyum, fer at hava við sær tættari og betri samstarv millum londini.

- Vit hava avtalað at gera okkara til at lætta um handilsmøguleikarnar millum londini bæði, sigur hann við Sosialin.

Til endans sigur russiski sendiharrin, at hann hevur stóra virðing fyri fólkinum her, og at hann vónar at nógv fleiri russarar fara at vitja í Føroyum í framtíðini.



*Her vitja tey í Tinginum, har Edmund Joensen, løgtingsformaður, greiddi frá um tingið og aktuellu politisku støðuna.*